# SOAP-genturnar vitja SMS

**Leygardagin fara systrarnar Line og Heidi úr heimskenda poppbólkinum SOAP at vitja á Torginum í SMS, har tær fara at skriva autografar**

TÓNLEIKUR



Um vikuskiftið verður bólkurin SOAP í Føroyum. Tað eru systrarnar Line og Heidi, sum mynda bólkin, og tær fara leygardagin at vitja á Torginum í SMS.

Har fara tær at skriva autografar, og møguleiki verður eisini at keypa seinastu fløgu teirra, sum kallast Miracle. Av hesi fløguni munnu mong hava hoyrt lagið, SOAP is in the air, sum hevur verið á hittlistum í nógvum londum.

Seinastu tíðna hevur SOAP ferðast kring Europa, har tær hava hita upp á konsertum við australska bólkinum Savage Garden.

Hetta hevur havt við sær, at SOAP-genturnar hava spælt fyri eini ørgrynnu av seinastu tíðina. Á teimum 19 konsertunum hava tað verið eini 130.000 áhoyrarar.

**Konsertir**

SOAP spælir lættan popptónleik, sum stílar eftir børnum og ungum. Og hesi aldursbólkar sleppa eisini at síggja og hoyra SOAP á konsertum um vikuskiftið.

Ítróttarhøllin á Kambsdali verður karmur um framførslurnar hjá SOAP, sum bæði eru fyri børn og ung. Børnini sleppa fram at fyrr á kvøldinum, meðan tey meira tilkomnu kunnu uppliva SOAP í dansinum, sum byrjar klokkan 23.00.

Men áðrenn hesar konsertir verður SOAP at hitta í Torginum í SMS. Tær verða har leygarmorgunin frá kl. 11.00.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og sólglottar, men okkurt ælið norðanfyri. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av norði og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 13 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 16 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 27 |
| Malta | – |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 22 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 990 hPa. eystan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og grynnist. Eitt hátrýst, 1034 hPa. í útsynning úr Írlandi stendur mestsum í stað.




Lágtrýstið millum Íslands og Noreg grynnist, men vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/09 kl. 06⁰⁰– 06/09 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 05/09 kl. 06⁰⁰– 06/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 21,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. sept.: Mánin longst frá jørðini
2. sept.: Fullmáni
10. sept.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. sep | 10.24 | 22.44 | 09.24 | 21.44 | 09.39 | 21.59 | 00.05 | 12.24 | 01.05 | 13.24 | 08.39 | 20.59 | 07.39 | 19.59 | 10.39 | 22.59 | 11.39 | 23.59 | 10.09 | 22.29 | 11.24 | 23.44 |
| 8. sep | 11.05 | 23.24 | 10.05 | 22.24 | 10.20 | 22.39 | 00.44 | 13.05 | 01.44 | 14.05 | 09.20 | 21.39 | 08.20 | 20.39 | 11.20 | 23.39 | - | 12.20 | 10.50 | 23.09 | — | 12.05 |
| 9. sep | 11.43 | — | 10.43 | 23.20 | 10.58 | 23.35 | 01.24 | 13.43 | 02.24 | 14.43 | 09.58 | 22.35 | 08.58 | 21.35 | 11.58 | — | 00.39 | 12.58 | 11.28 | — | 00.24 | 12.43 |
| 10. sep | 00.20 | 12.57 | 11.57 | — | - | 12.12 | 02.20 | 14.57 | 03.20 | 15.57 | 11.12 | 23.50 | 10.12 | 22.50 | 00.35 | 13.12 | 01.35 | 14.12 | 00.05 | 12.42 | 01.20 | 13.57 |


HESTPRENT Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo



TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG





12. MAÐUR
Tlf. 213212